| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 26. september 2013 |
| Býráðsfundur nr. | 07/2013 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2013 tann 26. september kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 19. September 2013 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 47/2013.**

***Mál viðvíkjandi 1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlanarkarmi fyri kommununa 2014.***

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 16 september 2013 til fyribils fíggjarætlanarkarm fyri kommununa fyri 2014.

Vísandi til § 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 01. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 01. desember.

Skattagrundarlagið er roknað út frá upplýsningum frá Taks, har inntøkan pr. 01. september 2013 er upproknað til eitt ár við skattaprosenti 21,5. Somuleiðis er botnfrádrátturin ásettur eftir útrokningum frá Taks.
Barnatalið er 409, og barnafrádrátturin er ásettur til til kr. 5.000,00 pr. barn í 2014, sum er sama upphædd sum fyri 2013.

Hjálagda uppskot, sum fíggjarnevndin hevur viðgjørt á fundi 18. september 2013 og gjørt broytingar til í mun til sjálvt uppskotið frá fyrisitingini javnvigar við kr. 68.247.382,00, somuleiðis sum ikki verður roknað roknað við nøkrum rakstraravlopi.

Eingin íløgu er beinleiðis avsett, men verða sambært uppskotinum rúm fyri íløgum upp kr. 11.371.882,00 av sjálvum rakstrinum.

Rakstrarútreiðslurnar brutto verða mettar til kr. 51.475.500,00 og netto til kr. 37.896.000,00, rentuútreiðslurnar + rentustuðulin til kr. 3.400.000,00 og avdráttirnir av føstum lánum til kr. 2.000.000,00.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 45.452.882,00 við einum skattaprosenti upp á 21,5%, partafelagsskatturin verður fyribils verður til kr. 6.000.000,00 og skattur av kapitaleftirlønum til kr. 1.200.000,00, meðan eingin inntrøka fyribils er avsett við sølu av grundstykkjum. Møguligar inntøkur verða inntøkuførdar undir íløgum teknisk mál.

Fíggjarnevndin samtykt á fundi 18. september 2013 at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarkarm fyri býráðið til 1. viðgerð.

Eftir 1. viðgerðina í býráðnum verður fíggjarætlanaruppskotið viðgjørt og gjøgnumarbeitt í føstu nevndunum í samráð við stovnsleiðarar og ábyrgdarfólk.

**Avgerð:**
Samtykt varð at beina málið aftur í fíggjarnevndina til víðari viðgerðar. (9-0).

**<u>Mál nr. 48/2013</u>**

**Uppskot til viðtøkur fyri eitt nýtt kommunufelag.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Kommunusamskipan Føroya, dagfest 17. September 2013 saman við endaligum uppskoti til viðtøkur fyri eitt nýtt kommunufelag.

Kommunurnar skulu skjótast møguligt og í seinasta lagi 1. november 2013 hava boðað frá, um tær taka undir við at skipa nýtt felag eftir fyriliggjandi leisti. Talan verður sostatt um samanlegging ar av Kommunusamskipan Føroya og Føroya kommunufelag.

Staðfest er, at arbeitt hevur verið í mong ár við samanleggingum av báðum feløgunum, tó uttan at komið er á mál.

Sambært uppskotinum til bygnað, so verður politiska skipanin tann, at aðalfundurin hægsta vald felagsins. Undir aðalfundinum verður eitt stýri við 13 limum, sum verða borgarstjórar, og verður formaðurin valdur av stýrinum.

Umboðanin í stýrinum byggir á 10 landafrøðislig økir. Kommunustýrini í hvørjum einstøkum øki gera semju um, hvør umboðar økið, og semjast tær ikki um umboðanina, so verður borgatstjórin í størstu kommununi umboð fyri økið.

Økið, har fleiri enn ein kommuna hava omanfyri 1.500 íbúgvar, fáa 2 umboð í stýrið.

Skipað verður fyri 4 borgarstjórafundum árliga.

Fyrisitingariga skipanin er tann, at settur verður ein stjóri, og ein starvsbólkur við kommunustjórum/kommunuskrivarum verður eins og higartil í KSF, sum ger síni tilmæli til stýrið.

Fyrisitingarliga skipanin umfatar eisini Barnaverndarstovuna, Kommunufelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini 18. september 2013, og mælir nevndin einmæld býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til viðtøkur fyri eitt nýtt kommunufelag.

**Avgerð:**
Tilmæli frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0). Sostatt tekur Fuglafjarðar kommuna undir við, at kommunufeløgini verða løgd saman sambært hjálagda uppskoti til viðtøkur.

Somuleiðis varð avgerð tikin um at heita á KSF um at bera so í bandi, at eitt netverk fyri havnirnar verður stovnsett eftir samanleggingina. Her verður víst til leist, ið nýttur er í samband við eitt nú teknisk-, sosialt- og fíggjarlig netverk innan KSF.

**<u>Mál nr. 49/2013.</u>**

**Uppskot til samstarvsavtalu við Eysturkommunu.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið uppskot frá Erik Lervig og Jákup Frants Larsen, dagfest 17. September 2013 um uppskot til samstarvsavtalu milum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu um skipan av barnaverndartænastu.

Fyriliggjandi uppskot til avtalu er gjørt eftir semju millum býráðini, hetta sambært §4, stk. 5 í løgtingslóg nr. 18 frá 18. mars 2005 um barnavernd, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 24. oktober 2012, har barnaverndarnevndir verða skipaðar innan einstøku samstarvsøkini, treytað av, at tað eru í minsta lagi 3.000 íbúgvar fyri hvørja barnaverndarnevnd.

*Uppskotið er greinað út í 10§, sum lýst niðanfyri:*

1. Samstarvsavtala millum Eystur- og Fuglafjarðar kommunur
2. Samstarvsnevnd
3. Barnaverndarnevnd
4. Skipan av økinum
5. Staðseting
6. Fígging av økinum
7. Starvsfólk
8. Kunning um virksemi og rakstrargongd
9. Roknskapur og grannskoðan
10. Gildiskoma og uppsøgn

Einki tilmæli er komið um staðseting sambært §5, við tað at hetta verður mett sum ein avgerð, sum eigur at verða tikin politisk.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í sosialu nevndini tann 23. september 2013 og mælir nevndin einmælt býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til samstarvsavtalu millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu um skipan av barnaverndartænastu frá 01. januar 2014 at rokna.

Tó mælir nevndin eisini býráðnum til at gera ískoyti til § 10 við eyka stk., "at samstarvsavtalan skal verða eftirmett beint eftir 1. januar 2015".

Viðvíkjandi punkti 5 um staðseting varð semja um, at borgarstjórin og forkvinnan í sosialu nevndini fara á fund við borgarstjóran og forkvinnuna í trivnaðarnevndini fyri Eysturkommunu beinanvegin, soleiðis at staðsetingin møguliga kann verða komin upp á pláss, áðrenn avgerð býráðsins verður gjørd í málinum hósdagin 26. september 2013.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka málið av skránni fyri at taka fund upp við Eysturkommunu beinanvegin um staðseting sambært §5. Tá ið ein niðurstøða fyriliggur, verður málið tikið upp aftur til viðgerðar í býráðnum á einum eykabýráðsfundi. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.00.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Birgir Peteresn

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen